# Grease í føroyskari útgávu

**Í 70-árunum herjaði sangleikurin Grease um nærum allan heimin, við John Travolta og Oliviu Newton-John í høvuðsleiklutunum sum Danny og Sandy. Í summar verður hann framførdur í Føroyum av ungdómsbólkinum í Havnar Sjónleikarafelag**

TÍÐINDASKRIV

Føroyingar fáa skjótt høvi at síggja Grease í føroyskari uppseting. Tað er ungdómsbólkurin í Havnar Sjónleikarskúla, sum er farin í holt við at venja føroysku útgávuna av sangleikinum saman við tónleikabólkinum Paradox. Leikstjóri og lærari er Hedvig Westerlund-Kapnas, og hon fær hjálp frá framleiðaranum Sóley Danielsen.

Í 70-árunum herjaði sangleikurin Grease um nærum allan heimin, við John Travolta og Oliviu Newton-John í høvuðsleiklutunum sum Danny og Sandy. Søgan fer fram í 50-árunum og snýr seg um trupulleikar, sum ung hava, um hvussu tey stuttleika sær og sjálvandi um kærleika.

Sangirnir og dansirnir gjørdust so vælumtóktir, at nógv ung fólk lærdu seg stevini, og framførdu dansirnar í felag, tá ið løgini frá Grease ljómaðu á dansistøðunum. Sangirnir frá Grease eru framvegis nógv at hoyra, og mangir skúlar og sjónleikarhús hava framført leikin. Í summar verður leikurin framførdur í fleiri leikhúsum í Danmark við Sofie Lassen-Kalkhe í høvuðsleiklutin sum Sandy, og Tomas Ambt Kofod sum Danny.

Og fyrstu tvær vikurnar í apríl, verður so leikurin framførdur í Sjónleikarhúsinum í Havn.

## TILTØK

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nærvarpið LUMI radio í Aalborg**
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax. 32586149 e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussar nr 2A og 12 steðga tætt við Kristnastovu.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.30 og verður endursend leygarkvøld kl. 19.30.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit eru vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Elin S. Wang, Melabraut 8, 170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
veitir ráðgeving og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir: mánadag, týsdag, hósdag 11.30-15.30 mikudag 14.00-18.00 og fríggjadag er stongt.
Vesterbrogade 17 A
1620 København V.
Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34
Teldupostur: radgevingin@radgevingin.dk
Heimasíða: www.radgevingin.dk

## KROSSORÐ



**Vinnari:**
*Eyðbjørg Johannesen*
*360 Sandavágur*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: GUTTABERG




**Hvønn fríggjadag**
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**401**

Loysunarorðið: ............................................

Navn: ............................................................

Bústaður: ....................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ☐ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ☐ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ☐ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** *- Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***